## Sjórænarar hótta hjún

Teir somalisku sjórænararnir, sum hava rænt eini bretsk hjún, sum vóru á veg í stuttleikabáti tvørtur um Indiska Havið, hótta nú við at beina fyri hjúnunum og at brenna líkini. Sjórænararnir siga, at fáa teir ikki loysigjald, fara teir at myrða hjúnini. Ein av rænarunum, Mohammed Hussein, sigur við blaðið Telegraph, at teir fara eisini við at beina fyri hjúnunum, um bretar ella onnur royna at fría tey við hermegi. Bretsku myndugleikarnir siga, at teir taka hóttaninar frá sjórænarunum í fullum álvara, men aðrar viðmerkingar hava teir ikki.



## Prestur skeyt eftir FBI

Ein skotbardagi í gjár ímillum amerikonsku samveldisløgregluna FBI og ein muslimskan prest í býnum Detroit endaði við, at presturin lá eftirá. FBI sigur, at presturin fór at skjóta eftir nøkrum løgreglumonnum, sum høvdu kringsett ein goymslubygning, sum presturin og nakrir av viðhaldsmonnum hansara høvdu fjalt seg í. Løgreglan skuldi taka tann 53 ára gamla Luqman Ameen Abdullah, tí hann stóð á odda fyri einum víðgongdum sunnimuslimskum felagsskapi, sum vil hava sín egna stat í USA, og sum tekur undir við teimum strangastu sharialógunum, skrivar AP.

# Trolbátaeigarar orka ik

**Tað er ikki lætt at reka fiskiskipavinnu í hesum tíðum, og alt fleiri skipa-og bátaeigarar gevast á hendur. - Eg havi verið hjá Føroya Banka við lyklunum til bátarnar, tí her gerst ikki meira, sigur maðurin, sum eigur trolbátarnar, Vesturfarið og Niclas**

SKIPAVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta árið eru fleiri skip í føroyska fiskiskipaflotanum farin av knóranum, og talan er bæði um stór og smá skip.

Menn, sum áttu trolbátar, ið høvdu loyvi at fiska á landleiðini um sumrarnar, hava eisini lagt árarnar inn.

Trolbáturin Randi, sum var heimahoyrandi á Toftum, er farin av knóranum fyrr í ár, og herfyri bar maðurin, sum eigur trolbátarnar, Vesturfarið og Niclas, eisini Føroya Banka lyklarnar til sínar bátar.

Raksturin gevur hall, menn klára nóg illa at loysa bátarnar, og lítið ella einki er til rentur og enn minni til avdrøg.

Soleiðis hevur støðan verið hjá einum parti av okkara fiskiskipaflota, síðan oljuprísirnir fyrst ruku til himmals, og tá hesir síðan gjørdust nøkulunda "normalir" aftur, fekst alt ov lítið fyri fiskin.

Aftrat hesum kemur, at veiðan hjá skipum og bátum, sum ikki fiska upsa, hevur verið í lakara lagi yvir eina longri tíð.

### Gevast á hendur

Fiskidagarnir í bólki 4T, sum bólkurin hjá trolbátum eitur, ið hava loyvi at fiska á landleiðini um sumrarnar, eru nógv skerdir, síðan vit fingu fiskidagaskipanina.

Hetta er ein bólkur, sum gjøgnum fleiri ár hevur megnað at fingið raksturin at hanga saman, og tí duga teir, sum í dag aka á knøunum og ikki fáa raksturin at hanga saman, illa at foreina seg við broyttu umstøðurnar.

Hevur tíðin uttanfyri 12 fjórðinga fiskimarkið svikið, hevur summarið, tá bátarnir eru slopnir á landleiðina at royna í nakrar mánaðir, sum oftast bjagað árinum.

Men nú sansar at hjá fleiri bátum í hesum bólki.

Trolbáturin Randi, sum var heimahoyrandi á Toftum, er farin av knóranum fyrr í ár, og um dagarnar hevur maðurin, sum eigur trolbátarnar, Vesturfarið og Niclas, eisini lagt árarnar inn.

- Eg havi givin skarvin yvir. Føroya Banki hevur fingið lyklarnar til bátarnar, sum nú liggja í Vestmanna, haðani bankin í fyrsta lagi roynir at selja bátarnar í fríari sølu, sigur hann.

Bátaeigarin vísir á, at árið í fjør serliga var merkt av høgu oljuprisunum, og tá oljuprísirnir aftur komu í eina líkinda legu, ruku fiskaprísirnir niður við umleið eini helvt av tí, teir vóru fyri 2-3 árum síðan.

- Prísirnir á flatfiski, sum vit serliga veiða á landleiðini um sumrarnar, hava verið lágir, og hetta saman við eini minkandi veiði hevur ført til, at raksturin ikki fæst at hanga saman, sigur hann.

### Bankar avgera

Menn, sum eiga og reka trolbátarnar, ið plaga at fiska á landleiðini um sumrarnar, duga væl at síggja, at bátatalið í hesum bólki er ov stór í mun til fiskidagatalið, sum eftir er í bólkinum.

- Nú verða tað so bankarnir, ið fíggja hesar bátar, sum koma at gera av, hvørjir skulu sleppa at sigla, og hvørjir skulu gevast, sigur báteaigarin.

Tað er felagið Sp/f Jónleyg, sum eigur Niclas og Vesturfarið.

Niclas hevur ikki verið til fiskiskap í longri tíð og nakrir dagar, sum trolbáturin átti, eru fluttir yvir á Vesturfarið.

Niclas eigur stívliga 40 troldagar eftir, og báturin eigur eisini umleið sama tal av línudøgum.

Vesturfarið eigur stívliga 80 troldagar.

Skulu bátar, sum koma í slíka støðu, sum Niclas og Vesturfarið eru komnir í, hava nakran møguleika at loysa aftur undir verandi eigara, er hugsandi, at bankin antin krevur pening á borðið – ella, at fastognir verða settar í veð.





# Fleiri skip og bátar landað

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu dagarnar hava fleiri skip og bátar landað í Sørvági, og landingarmiðstøðin hevur soleiðis bæði landað ísfiskatrolarar, línuskip, garnaskip og útróðrarbátar.

Partrolararnir Vesturvarði og Vesturskin hava verið inni við 200.000 pundum. Royndin var einar 10 dagar, og meginparturin av veiðini var upsi.

Línubáturin Kambur hevur eisini landað í Sørvági í vikuni. Teir høvdu bert fáar setur á hesum túrinum, og veiðan var eini 50.000 pund.

Sum skilst, hava fleiri línuskip, sum ikki eru undir Íslandi, roynt vestur úr Mykinesi.

Garnabáturin Drelnes landaði í vikuni eini 20.000 pund av hvtasku í Sørvági.

Á Landingarmiðstøðin í Sørvági hava tey annars landað fleiri størri og smærri útróðrarbátar seinastu dagarnar. Onkur bátur hevur